# Umsókn um stuðul til bústaðarbroyting

sambært § 27 í lóg um almannatrygd og tænastur til persón, ið hevur týðandi og varandi skert virkisføri, tá ið bústaðarbroytingin er mett neyðug til tess at gera bústaðin betur egnaðan sum tilhald

## Upplýsingar umsøkjarans

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Navn *(barnsins navn, um søkt verður vegna barn)* | | | | P-tal | |
| Bústaður | | | | Fartelefon | |
| Býur | | Postnr. | | Telefon | |
| Teldupostur | | | | Kommunulækni | |

## Avvarandi

| | | | |
|---|---|---|---|
| Avvarðandi, ið Almannaverkið kann samskifta við, um umsøkjarin ikki sjálvur kann | | | |
| Navn | | Fartelefon | |

## Søkt verður um stuðul til

| | Set x | Stutt lýsing av hvat skal gerast |
|---|---|---|
| Broyting av verandi bústaði | | |
| Tillaging av verandi atkomuviðurskiftum | | |
| At flyta bústað (heilt serligar umstøður) | | |
| Ráðgeving um bústaðarviðurskifti | | |

## Lýs praktiskar trupulleikar, sjúku ella brek, sum forðar tær í gerandisdegnum heima við hús

## Seinasta kanning / viðgerð

| | | | |
|---|---|---|---|
| Nær | | Hvar | |

## Aðrar upplýsingar

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Um annar persónur enn umsøkjarin hevur útfylt umsóknarblaði | Navn | | Fartelefon | |

## Váttan

| | |
|---|---|
| Undirritaði/a váttar við hesum, at upplýsingarnar í hesum umsóknarblaði eru rættar og at eg loyvi Almannaverkinum at savna neyðugar upplýsingar til málsviðgerðina. | |
| Dagfesting | Undirskrift (Umsøkjarans, avvarðandi ella foreldra/verja) |
| | |

**Umsóknin skal sendast ella latast inn til Almannaverkið.**



Staravegur 18 • Postboks 3096 • FO-110 Tórshavn
Tel 360000 • Faks 360001 • av@av.fo • www.av.fo

# Umsókn um stuðul til bústaðarbroyting

sambært § 27 í lóg um almannatrygd og tænastur til persón, ið hevur týðandi og varandi skert virkisføri, tá ið bústaðarbroytingin er mett neyðug til tess at gera bústaðin betur egnaðan sum tilhald

## Kunning um stuðulsmøguleikar og afturgjaldsskyldu

### Stuðulsmøguleikar

**Verandi bústaður**
Stuðul verður veittur til at innrætta bústað til persón, ið hevur týðandi og varandi skert virkisføri, tá ið bústaðarbroytingin er mett neyðug til tess at gera bústaðin betur egnaðan sum tilhald.

**Møguliga annar bústaður**
Í teimum heilt serligu førunum, har stuðul ikki verður mettur at vera nøktandi til at gera bústaðin betur egnaðan sum tilhald, kann stuðul veitast til at gjalda útreiðslurnar at útvega annan bústað. Hesin stuðul er treytaður av, at annar bústaður ikki kann ávísast, ið nøktar tørvin hjá viðkomandi.

### Lýsing av bústaði og afturgjaldsskyldu

**Egin bústaður**
Bústaður er egin bústaður, leigubústaður, bústaður heima hjá øðrum ella annað slag av bústaði.

**Virðisøking** (lán fellur til gjaldingar við eigaraskifti)
Hevur innrættingin av bústaðnum við sær eina virðisøking á 10% ella meira, verður tann parturin av stuðlinum, sum samsvarar hesi virðisøking, veittur sum rentu- og avdráttarfrítt lán, ið fellur til gjaldingar við eigaraskifti.

**Annan bústað**
Almannaverkið kann í heilt serligum førum veita persóni stuðul til at útvega annan bústað.

**Virðisøking** (lán fellur til gjaldingar við eigaraskifti)
Tann parturin av stuðlinum, sum svarar til munin millum virðismetingina av verandi og fyrrverandi ognini, verður veittur sum rentu- og avdráttarfrítt lán, ið fellur til gjaldingar við eigaraskifti. Almannaverkið letur húsameklaravirki gera virðismetingina.

**Tinglýsing**
Fyri at tryggja lánini, verður veðbræv uppsett og tinglýst ávikavist í ognini, har bústaðarinnrættingin er framd, ella í nýggju ognini. Almannaverkið ber fyrisitingarligu útreiðslurnar av hesum.

**Møgulig niðurskriving**
Lánini kunnu niðurskrivast yvir eitt tíðarskeið upp til 20 ár, um so er, at virðisøkingin minkar í tíðarskeiðnum.

**Kæruvegleiðing**
Avgerðir, um bústaðarbroytingar, kunnu kærast til Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum innan 4 vikur frá tí degi, kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina.

Kærunevndin kann víkja frá freistini, um serlig orsøk er til tað.

**Lógarheimild**
Víst verður til lóg um almannatrygd og tænastu § 27 og tilhoyrandi kunngerð um stuðul til bústaðarbroytingar til persónar við týðandi og varandi skerdum virkisføri.

**Barn**
Verður søkt vegna barn, er tað barnsins navn og p-tal, sum skal upplýsast. Aðrir kontakupplýsingar so sum telefonnumar og teldupostur skulu verða foreldranna/verjans.



Staravegur 18 • Postboks 3096 • FO-110 Tórshavn
Tel 360000 • Faks 360001 • av@av.fo • www.av.fo